



BYGGISKRÁ - útgáva 2, 14. apríl 2023

KAMPUS, FELAGSBYGNINGUR

LANDSVERK

INNIHALD

1.0.	**Inngangur**	2
1.1.	**Hugsjón**	2
1.2.	**Byggiánari og byggiharri**	3
2.0.	Fortreytir	4
2.1.	**Søguligar fortreytir**	4
2.2.	**Aðrir aktørar**	5
2.3.	**Byggiøkið**	5
2.4.	**Atkomuvegir**	5
2.5.	**Myndugleikakrøv**	5
2.6.	**Grannar og nærumhvørvið**	5
2.7.	**Grundarlag**	5
3.0.	Krøv og ynski til málið	6
3.1.	**Yvirskipað krøv**	6
3.2.	**Felagsfunktiónir**	8
3.3.	**Undirvísing**	11
3.4.	**Lestrarumhvørvi**	12
3.5.	**Skrivstovur**	13
3.6.	**Stuðulsfunktiónir**	14
3.7.	**Burðardygd**	14
3.8.	**Av- og áskipan og atkoma**	15
3.9.	**Útiøkið**	16
3.10.	**List**	16
3.11.	**Rakstur og viðlíkahald**	16
3.12.	**Hitaverk**	16
4.0.	Teknisk krøv	17
4.1.	**Studio**	17
4.2.	**Høli til konsertir**	17
4.3.	**Samskiftistøkni**	17
4.4.	**Luftskifti**	17
4.5.	**Innleggingar**	17
4.6.	**Bruni**	17
5.0.	Fígging og tíðarætlan	18
5.1.	**Fíggjarlig viðurskifti**	18
5.2.	**Tíðarætlan**	18
5.3.	**Fylgiskjøl**	18

Yviri við Strond 17 // Postsmoga 78 // FO-110 Tórshavn // Tel. +298 340 800 // lv@lv.fo // www.landsverk.fo

LANDSVERK

1.0. Inngangur

Barna- og útbúgvingarmálaráðið og Landsverk bjóða við hesum undangóðkendum ráðgevum at luttaka í arkitektakapping um felagsbygning til Fróðskaparsetur Føroya.

Hetta er ein projektkapping, sum byggir víðari á strategisku kampusætlanina frá 2018 og á arbeiði, sum síðani hevur verið gjørt í kampusbólkinum.

Felagsbygningurin er staðsettur í Nóatúni millum Frælsið og Debesartrøð og er kjarnin í eini yvirskipaðari heildarætlan at savna alt virksemi hjá Fróðskaparsetri Føroya í ein samanhangandi lestrar- og granskingarbýling, sum fevnir um økið á Frælsinum og økið á Debesartrøð.

Alt okkara lívsgrundarlag, allur okkara samleiki og øll okkara tilvera eru bygd á teir førleikar, ta vitan og tað áræði, sum fólkið her hevur. Fyri at kunna mennast og trívast er neyðugt við útbúgving og gransking á høgum stigi, ið støðugt kann menna okkum sum samfelag. Ein fortreyt fyri hesum er góðir fysiskir karmar.

Í 2021-22 eftirmetti ein altjóða serfrøðingabólkur virksemið á Setrinum, og fremsta tilmælið um góðskumenning av útbúgvingunum var at skunda undir at fáa bygt universitetsbýlingin, har alt virksemið hjá Setrinum verður savnað. Tey skrivaðu:

"Allir áhugapartar eiga at skunda undir ætlanina at fáa eitt savnað universitetskampus í Havn, sum skal sniðgevast, so at fólk trívast við at læra og búleikast har. Sniðgevingin eigur at taka útgangsstøði í tørvunum hjá lesandi, atkomuligheit og akademiskari dygdargóðsku og við tí í hyggju, at kampus skal draga bæði føroysk og altjóða lesandi at sær."

1.1. Hugsjón

Felagsbygningurin skal vera dukandi hjartað á Setrinum og ein vitanarviti í Norðurhøvum.

Ynskiligt er at fáa ein bygning, har trivnaðurin er í hásæti. Ein bygning við høgari arkitektoniskari góðsku, ið kann savna Setrið og soleiðis gera Havnina til ein veruligan universitetsbý.

Felagsbygningurin skal fyrst og fremst vera eitt livandi lestrarumhvørvi við lesisali, bólkarúmum og krókum, har høvi er at hugsavna seg. Har skal vera ein góð felags móttøka og bókasavnstænasta til lesandi og onnur við ørindum á Setrinum.

Í felagsbygninginum skulu vera fjølbroytt undirvísingarhøli, sum deildirnar á Setrinum kunnu nýta eftir tørvi. Har skulu vera liðiligar samkomuhallir, sum kunnu húsa felagstiltøkum, prógvhandanum og størri altjóða ráðstevnum.

Í felagsbygninginum skal vera møguligt at fáa okkurt til matna og okkurt at drekka, og felagsbygningurin skal í mest møguligan mun vera opin fyri almenninginum.

Harumframt skal felagsbygningurin vera skrivstovubygningur hjá miðfyrisitingini á Setrinum og húsa rektara, felagsfunktiónum og fundarhølum.

Uttan um felagsbygningin er eitt fjølbroytt býarumhvørvi við bæði verandi og komandi bygningum. Hetta fevnir millum annað um skrivstovur, undirvísingarhøli, starvsstovur, søvn, grøn øki, ítróttarhøli, parkering, lestrarbústaðir, sethús, dagstovnar, sjúkrahús, handlar og ídnað.

Samstundis sum at felagsbygningurin skal húsa umsitingarliga kjarnanum á Setrinum, skal hava høli til samkomur og undirvísing og skal vera ein opin vitanardepil, har lesandi, granskarar og onnur hava hug og umstøður at hugsavna seg og samstarva allar tíðir á degnum og alt árið, skal hann binda alt býarumhvørvið saman.

Hetta setur stór krøv til eina samansetta arkitektoniska loysn, har pláss er bæði fyri tí afturlatna, tí hálvopna og tí opna. Møguleiki skal vera at arbeiða í friði, møguleiki skal vera at hava fundir, undirvísing og tiltøk, sum kunnu vera meira og minni opin, og møguleiki skal vera at flyta seg frítt í pørtum av felagsbygninginum og møta fólki av tilvild.

Setrið vil ganga á odda við burðardyggari og skynsamari bygging, og ynskiligt er, at felagsbygningurin verður ein fyrimynd fyri framtíðar føroyska byggilist, verkfrøði og handverk.

Felagsbygningurin skal vera kjarnin í einum vitanarumhvørvi, ið gjøgnum útbúgving, gransking og samstarv ríkar og gevur ávøkstur til alt tað føroyska samfelagið.

1.2. Byggiánari og byggiharri

Byggiánari:
Barna- og útbúgvingarmálaráðið
Tinghúsvegur 7
FO-100 Tórshavn
bumr@bumr.fo

Byggiharri/ráðgevi:
Landsverk
Yviri við Strond 17
FO-100 Tórshavn
lv@lv.fo

Verkætlanarleiðari:
Bárður í Baianstovu
Landsverk
Yviri við Strond 17
FO-100 Tórshavn
biba@lv.fo

2.0. Fortreytir

2.1. Søguligar fortreytir

Fyrsta fet móti einum altjóða universiteti varð tikið, tá Fróðskaparfelag Føroya varð sett á stovn í 1952. Endamálið var at fáa í lag gransking og vísindaligar útgávur á føroyskum og at fyrireika hægri undirvísing her á landi.

Í 1965 tóku hesi undangongufólk stig til at stovna Fróðskaparsetur Føroya, Academia Færoensis, og Christian Matras, professari, varð settur í fyrsta vísindastarv á Setrinum. Afturat sær hevði hann Maud Heinesen sum skrivara og umsitingarfólk.

Fyrstu árini vórðu skeið boðin út í føroyskum og náttúruvísindum, og í 1972 varð 2 ára tvørfaklig støðisútbúgving innan náttúruvísindi boðin út við møguleika at lesa víðari til kandidat í Danmark. Eitt tíðarskeið bar til at lesa ein part av læknaútbúgvingini í Føroyum og gera útbúgvingina lidna í Odense. Filosofikum og gudfrøði vóru aðrar útbúgvingar, sum duttu niður fyri. Men í 1980-árunum komu útbúgvingar í søgu og samfelagsvísindum, sum hava verið síðan.

Við løgtingslóg nr. 65, 21. mai 1987 um Fróðskaparsetur Føroya, Universitas Færoensis, fekk Setrið universitetsstatus. Nú bar til at taka fullar bachelorútbúgvingar. Árið eftir, í 1988, varð Studni settur á stovn, og í 1996 kom tann triði stovnurin, sum ráðgevur og stuðlar gransking í Føroyum, nevniliga Granskingarráðið.

Í 2008 vóru Lærara- og Sjúkrarøktarfrøðiskúlin lagdir saman við Setrið. Við hesari samanleggingini vaks Setrið munandi, og hetta setti nýggj krøv til fysisku karmarnar og skipanina av virkseminum á Setrinum. Avgerðin um at leggja hesar stovnar saman var eitt týðandi fet á leiðini at menna Fróðskaparsetrið til eitt altjóða universitet. Seinastu árini eru fleiri útbúgvingar komnar afturat so sum løgfrøði, búskaparfrøði og námsfrøði.

Frá byrjan hevur Setrið verið ein granskingarstovnur, sum fremur viðkomandi gransking til føroyska samfelagið. Tað, sum er serligt við einum lærdum háskúla, er júst samanspælið millum undirvísing og gransking, so lesandi fáa feskastu vitanina, og granskarar fáa íblástur frá ungum sum eldri forvitnum lesandi, sum vilja læra. Tí er tað so avgerðandi, at nýggju karmarnir koma at stimbra undir júst henda dynamikkin, so vit øll fáa mest burturúr.

Nógv av granskingini, sum hevur verið gjørd á Setrinum, hevur lagt lunnar undir nýskapandi virksemi í samfelagnum. Granskingin á Setrinum gjørdi tað møguligt at menna orðabøkur, hav- og streymgransking hevur gjørt tað møguligt at fara undir at útvinna el-orku úr havstreymi og so framvegis.

Í 2020 var Fróðskaparsetur Føroya góðkent sum undirritari av Magna Charta Universitatum, ið er eitt felags virðisgrundarlag, universitet arbeiða eftir. Sjálvræði, politiskt óheftni og granskingarfrælsi eru kjarnuviðir. Setrið hevur undirritað skjalið saman við 904 øðrum universitetum úr 88 londum, og hetta er eitt risa fet framá móti einum altjóða universiteti í Føroyum.

Seinastu árini hevur Setrið verið í einari tilgongd at menna allar útbúgvingarnar eftir Bolognaleistinum, sum er ein felags leistur, flestu universitet í Vesturheiminum eru skipað eftir. Hetta fer at styrkja flytføri hjá okkara lesandi og gera tað lættari at vitja onnur universitet sum skiftislesandi, og at prógv frá Setrinum fáa altjóða viðurkenning.

Umráðandi fyri at fáa góðkenning er, at Setrið hevur góðar skipanir at stuðla teimum lesandi í at fullføra lesnaðin. Hetta krevur, at hølini skulu kunna nýtast av rørslu-, hoyri- og sjónbrekaðum. Lesandi mugu hava lætta atgongd til stuðulstænastur so sum at fáa leiðbeining frá Studna og Altjóða skrivstovuni. Kampus má vera eitt stað, har tey lesandi trívast. Setrið er í serstøðu millum evropeisk universitet, tá talan er um tal á lesandi, sum eiga smá og ung børn, og hugnalig felagsøki við spæliplássum, lesikrókum v.m. fara at økja um trivnaðin.

Nógv er hent, síðan fyrsti lesandi í føroyskum byrjaði hjá Christiani Matras professara í 1965, og Maud Heinesen var einasta skrivstovufólk. Í dag eru 1.000 lesandi, 144 ársverk á 24 ymiskum útbúgvingum og útbúgvingar á bæði bachelor-, master- og á ph.d stigi. Undirvísingar- og granskingarvirksemið, sum í dag fer fram á Setrinum, setur alsamt størri krøv og verður ofta útint í samstarvi við samstarvsfelagar í Føroyum og á øðrum universitetum úti í heimi. Alt hetta setur stór krøv til fysisku karmarnar.

2.2. Aðrir aktørar

Felagsbygningurin er fyrst og fremst fyri tey lesandi og starvsfólkini á Setrinum. Tó eru øll onnur vælkomin, og bygningurin skal vera innbjóðandi fyri almenningin.

Felagsbygningurin skal eisini vera karmur um konsertir, ráðstevnur og onnur tiltøk, sum Setrið sjálvt ikki skipar fyri.

2.3. Byggiøkið

Byggiøkið fevnir um matrikkul nr. 1023a, 1023b, u1017d og 1025a. (*Sí fylgiskjal 01).*
Tað kann hugsast, at fimleikarhøllin, sum er partur av skúlanum á Frælsinum 20 (Venjingarskúlanum), skal fáa nýggja staðseting, tá deildarbygningar verða bygdir seinni. Hetta má hugsast inn í heildarætlanina fyri kampus.

2.4. Atkomuvegir

Projekterandi skal tryggja, at atkomuvegir lúka almenn krøv, og at ferðslan verður smidlig bæði til og frá bygninginum og órógvar aðra ferðslu sum minst. Somuleiðis skal tryggjast, at tað ber til at seta fólk av uttan fyri bygningin, og at hetta kann loysast á skilabesta hátt.

Stuðulsfunktiónir sum matstova, setursbókasavn, goymslur, reingerð o.a., sum krevja atkomu við størri akførum, skulu helst skipast soleiðis, at tær ikki ávirka atkomuna og gerandisdagin hjá teimum vitjandi/lesandi í felagsbygninginum.

2.5. Myndugleikakrøv

Byggiøkið hevur byggisamtykt D3 Almennir stovnar. Hetta hevur við sær, at ein serstøk byggisamtykt má í lag, áðrenn byggingin kann byrja sambært §23 stk. 6 í Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

2.6. Grannar og nærumhvørvið

Grannar, ið missa atkomuveg við bili til síni hús, skulu fáa eina nýggja atkomu áðrenn farið verður undir bygging. Hetta er serliga galdandi fyri grannar við atkomu úr Nóatúni í dag og má tískil hugsast inn í heildarætlanina.

2.7. Grundarlag

Byggiskráin er gjørd við støði í heildarætlan, gjørd í 2018 (*Sí fylgiskjal 02*), verkstovum við øllum starvsfólkum í november 2022 og neyvari brúkarafundum við allar deildir, leiðslu og húsavarðar desember 2022 og januar 2023.

Heildarætlanin frá 2018 tekur støði í, at skúlin á Frælsinum verður burturbeindur. Avtala millum land og kommunu um, at Setrið skal úr Sjóvinnuhúsinum við árslok 2024 ger, at skúlin *ikki* verður tikin niður. Hann verður tí ein partur av heildarætlanini. (*Sí fylgiskjal 03)*

Yviri við Strond 17 // Postsmoga 78 // FO-110 Tórshavn // Tel. +298 340 800 // lv@lv.fo // www.landsverk.fo

3.0. Krøv og ynski til málið

3.1. Yvirskipað krøv

Eitt vinnandi uppskot til felagsbygningin skal ganga ynskjunum hjá Setrinum og øðrum brúkarum best á møti. Hesi ynski, ið øll eru umráðandi, eru í stuttum:

- Ein bygningur við stórari atdráttarmegi og einum stimbrandi lestrarumhvørvi fyri tey lesandi, sum tey hava hug at fara til og at vera í.
- Ein bygningur, sum smidliga kann tillaga sínar fysisku karmar eftir tørvinum hjá brúkaranum. Serliga tey størru hølini skulu hava møguleika at broytast fyri at røkka fleiri endamálum.
- Ein bygningur, sum er partur av almenna býarrúminum og landslagnum og verður partur av einum nýggjum býlingi í høvuðsstaðarøkinum.
- Ein bygningur, sum hevur høga arkitektoniska dygd og við síni útsjónd umboðar tey virði, eitt universitet skal hava í Føroyum.
- Ein bygningur, ið er ein fyrimynd fyri burðardygga bygging við atliti at sosialum, umhvørvisligum og fíggjarligum viðurskiftum.

Visjón fyri felagsbygningin


Fróðskaparsetur Føroya vil byggja ein nýggjan felagsbygning, sum kann savna og vísa fram eina rød av týðandi universitetsfunktiónum, staðsettar mitt í kampus.

Málið er, at bygningurin fer at vera karmur um stóra samvirkan innanhýsis á Setrinum tvørtur um deildir, starvsfólk og lesandi, og at hann í stóran mun verður við til at skapa eitt virkið og dynamiskt lestrarumhvørvi á Fróðskaparsetri Føroya.

Yviri við Strond 17 // Postsmoga 78 // FO-110 Tórshavn // Tel. +298 340 800 // lv@lv.fo // www.landsverk.fo

Innihald í felagsbygninginum

Fróðskaparsetrið vil, at ein komandi felagsbygningur verður bygdur sum ein sentral og savnandi eind á kampus.




Ynskið er, at eitt ørgrynni av felags- og hjálparfunktiónum kunnu staðsetast á sama staði, so at tær síggjast og eru lætt atkomuligar, samstundis sum samvirkanin og netverkið millum deildirnar og lesandi verður styrkt.

Deildarleiðslurnar verða sjálvandi staðsettar í deildarbygningunum. Harafturat skal tað vera møguligt hjá starvsfólki á deildunum at kunna hava tætt samstarv bæði deildanna millum og við setursleiðsluna. Hetta verður møguligt við at byggja nógv liðilig skrivstovuarbeiðsstøð - sokallaðar flex-skrivstovur - í felagsbygninginum, sum starvsfólkini kunnu arbeiða í og nýta plássini eftir tørvi.

Felagsbygningurin skal innihalda

- Fyrikomandi móttøku og sjónliga høvuðsinngongd
- Eitt stórt felagsrúm, eitt opið samkomustað, sum gjarna er merkt av einum grønum umhvørvi sum í einum vakstrarhúsi
- Matarstøð, kantinu og kafe
- Fríggjadagsbarr
- Fyrilestrasal
- Høli og hentleikar til ráðstevnur
- Undirvísingarhøli
- Arbeiðsstaðir til lesandi og afturlatið umhvørvi
- Lesisal
- Framsýningarhøli
- Høli til setursleiðsluna
- Liðilig skrivstovupláss til deildarleiðslurnar

Rúmyvirlitið (*Fylgiskjal 04*) tilskilar tal av rúmum, íroknað m² fyri hvørt slag av rúmi.



3.2. Felagsfunktiónir

Høvuðsinngongd

Høvuðsinngongdin til nýggja felagsbygningin skal vera sjónlig, so at øll, ið nýta bygningin, vita, hvar høvuðsinngongdin er. Umframt eina ásýniliga inngongd er tað eins umráðandi, at øll í bygninginum verða víst á rættan veg við góðari skelting. Øll skulu hava atkomu gjøgnum høvuðsdyrnar, óansæð fysiskar ella sálarligar førleikar. Aðrar inngongdir skulu eisini vera, og tær skulu vera lættar at finna, so at ein ikki er bundin at ganga inn gjøgnum høvuðsdyrnar.

Opin samkomustaður - felagsrúm

Inngongdin leiðir inn til forhøll og opið atrium/torg. Atriumið er eitt innbjóðandi opið rúm við nógvum funktiónum og nógvari ferðslu, har lesandi, starvsfólk, uttanhýsis brúkarar og gjarna eisini fólk úr grannalagnum koma úr ymsum ættum og krossast.

Rúmið er sera gjøgnumskygt. Tað hevur nógv dagslýsi, sum kemur úr erva og frá síðunum, og har er ríkiligt av virksemi og lívi í atriuminum. Stórur, grønur vøkstur í miðjuni í rúminum ger, at partar av atriuminum minna um eina havastovu. Tað grøna leggur ein friðsælan og kveikjandi dám á rúmið og ger tað livandi og kveikjandi.

Sum nevnt, er nógv virksemi og rørsla gjøgnum atriumið týdningarmikið fyri upplivingina av rúminum.

Fyri at styðja upp undir tað, skulu ymiskar funktiónir beinleiðis knýtast upp í atriumið. Hesar eru:

- Móttøka/kunningarstova/smásøla
- Lestrarskrivstova
- Stórar trappur
- Nógv ymisk sitipláss
- Kafe - í sambandi við kantinu og matarstøð
- Pláss til framsýningar, móttøkur, hátíðarhald, veitslur, støkk-upp og møguliga ein opnan fyrilestur
- Framsýningarhøli
- Bókasavnstænasta
- Lesisalur
- List

Matarstøð

Tað er eitt stórt ynski hjá Setrinum at kunna bjóða okkurt heilsugott og væl fyrireikað til mat og drekka tætt við. Bæði fyri at kunna styðja upp undir ein góðan lestrar- og arbeiðsdag og fyri at tryggja góðan dynamikk og gott lív á kampus so nógvar tímar í samdøgrinum, sum til ber. Ynskið er, at matarstøðini kunnu virka sum eitt stórt úrval av samanhangandi tilboðum í felagshúsinum, sum gjarna eru innrættað ymiskt, og sum styðja upp undir einfalda huglagið í tilboðunum.

Matarstøðini kunnu tí við fyrimuni skipast sum ein marknaðarhøll t.d., har vitjandi kunnu keypa mat av tí slagi ella av tí tilboði, sum tey hava hug til ein ávísan dag. Ynskt verður, at matarstøðini verða staðsett í einum opnum rúmi í beinleiðis sambandi við t.d. "havastovuna" - eitt vakurt, grønt rúm, sum førir til útiøkini.

Fyri at kunna bjóða mat og drekka á áhaldandi høgum støði skal ein framleiðslukøkur byggjast. Køkurin skal hava beinleiðis samband við matarstøðini, og hann skal um gjørligt byggjast sum eitt hálvopið rúm, so at gestir kunnu eygleiða matgerðina. Sjálvandi skal serligur dentur leggjast á akustikk, luftgóðsku og larm úr køkinum, um henda loysnin verður vald.

Sum tilknýti til "marknaðarhøllina" kunnu aðrar møguliga meira siðbundnar innrættingar gerast, sum t.d. ein vanlig kantina, ein lítil matstova el.tíl.

Kafe

Ein kafe skal innrættast afturat matarstøðunum. Kafein skal vera opin fyri øllum; børnum, vaksnum, starvsfólkum, studentum og grannum. Kafein skal vera staðsett í felagsbygninginum á tann hátt, at beinleiðis samband verður millum inni og úti, soleiðis at tað ber til at fara útum og sita í friði og náðum í einum lýggjum og stillum horni og njóta ein kopp av kaffi el.tíl.

Umframt matarstøðini og kafeina skulu nakrar kaffistøðir og uppihaldsstovur spjaðast um bygningin í nánd av læruumhvørvunum.

Matarstøðini skulu í einum skipast sum:

- Marknaðarhøll
- Kafe og snakkbarr

- Kaffistøðir í uppihaldsstovum

Høli og hentleikar til ráðstevnur

Setrið vil, at felagsbygningurin skal hava høli og hentleikar til størri og minni ráðstevnur.

Bókasavnstænasta

Bókasavnstænasta og lesisalur skulu vera knýtt at felagsøkinum og hava gott samband við Landsbókasavnið. Bókasavnstænastan skal stuðla øllum deildum á Setrinum og kann hugsast saman við arbeiðsøkjum til lesandi, bólkaarbeiði og bókabúð.

Yviri við Strond 17 // Postsmoga 78 // FO-110 Tórshavn // Tel. +298 340 800 // lv@lv.fo // www.landsverk.fo

3.3. Undirvísing

Undirvísingar- og lestrarhentleikar til nútímans læring

Modernaður didaktikkur krevur nýggjar læruhentleikar og umhvørvi til virkna læring. Hetta fevnir um eina rúgvu av funktiónum frá afturlatnum undirvísingarhølum til uttandura pláss, sum stuðla formligari og óformligari læring. Tey óformligu lestrarumhvørvini eru eins umráðandi og tey formligu, so sum fyrilestrasalir og floksstovur. Og umráðandi er, at tey øll eru liðilig undirvísingarhøli og soleiðis kunnu tillagast tørvin til eina og hvørja tíð.

Rák í læring vísa, at virkin læring styrkir avrikið hjá lesandi samanborið við óvirkna læring. Vit læra kortini uppá ymiskar mátar, og framtíðarlæruhentleikar skulu vera liðiligir og ganga morgindagsins tørvum á møti.

Undirvísingarhøli og læruumhvørvi skulu innihalda hentleikar til at gagnnýta høvuðstilboð Setursins, sum er undirvísing og gransking. At kunna bjóða eitt breitt, men serbúgvið úrval av læruhentleikum við góðari góðsku er neyðugt fyri framtíðarmenningina av Setrinum. Í komandi felagsbygningum skulu nógv ymisk undirvísingarhøli byggjast, so sum vanlig undirvísingarhøli, liðilig undirvísingarhøli, bólkarúm, lestrarumhvørvi og fyrilestrasalir.

Smidlig undirvísingarhøli

Smidlig undirvísingarhøli verða eitt nú nýtt til klassiska, formliga læring og undirvísing, har undirvísarin er staddur í miðjuni framman fyri studentunum, sum t.d. sita í rað við skriviborð. Men tey skulu eisini kunna nýtast til aðra undirvísing, og tí skulu aðrar innrættingar av rúminum vera møguligar, t.d. at fleiri skriviborð verða sett saman til bólkaarbeiði, ella at skilaveggir verða tiknir fram ella burtur, ið gera hølini minni ella størri. Undirvísingarhølini kunnu eisini hugsast at gerast til bólkarúm, alt eftir tørvi. T.d. í prógvtøkutíð er ikki nógv undirvísing, men nógv bólkaarbeiði.

Innbúgvið í undirvísingarhølunum er fyri tað mesta leysir møblar, ið kunnu flytast: til studentarnar eru skriviborð og stólar, sum kunnu stillast, og undirvísarin hevur eitt skriviborð og ein stól, sum eisini kunnu stillast. Harumframt eru nakrir fastir møblar so sum skíggjar, tussjtalvur ella snildtalvur, sum hanga á øllum fýra veggjum, tí so verður smidligari at nýta rúmið. Kontaktir við streymi skulu vera lætt atkomuligar hjá øllum í stovuni, eisini hjá teimum í miðjuni, og tað skal ikki tarna útsýninum til talvuna.

Vanligu undirvísingarhølini skulu staðsetast eftir framsíðuni á bygninginum fyri at fáa so nógv dagslýsi sum gjørligt. Hugsast skal um val av tilfari, so luft- og ljósviðurskifti vera optimal, og undirvísingin ikki verður órógvað av ferðslu ella øðrum ófriði uttan fyri flokshølini.

Smidlig undirvísingarhøli skulu lúka almennu treytirnar fyri akustikk í undirvísingarhølum. Harafturat skal serligur dentur leggjast á akustikk í rúminum, um tað skal vera møguligt at skipa fyri fjarundirvísing við nógvum luttakarum í rúminum.

Samanspæl millum undirvísing inni og úti kann gerast viðkomandi í undirvísingarhølum.

Fyrilestrasalur og auditorium

Ein fyrilestrasalur/auditorium við stólarøðum á ymsum, forskotnum hæddum (terrassum) er eitt ynski í nýggja felagsbygninginum. Fyrilestrasalurin skal kunna rúma minst 80-300 fólkum. Hetta slagið av undirvísingarhøli ger tað møguligt at skipa fyri siðbundnari undirvísing, har undirvísarin stendur í miðjuni framman fyri studentunum. Harumframt kann salurin brúkast til eitt nú filmssýningar, konsertir o.a., um tekniska útgerðin og akustikkstillingin liva upp til tess. Fyri at tryggja, at hølini vera brúkt nóg mikið, er ynskiligt at kunna býta auditoriið upp í minni høli til 80-100 fólk, tá tað ikki er tørvur á at brúka alt auditoriið. Til størri tiltøk, t.d. prógvhandan, er ynskiligt at onnur høli, t.d. kantina og samkomustaður, kunnu knýtast at auditoriinum til eina stóra høll, soleiðis at uml. 500 fólk kunnu vera saman.

Eitt frábrigdi av fyrilestrasalinum við stólarøðum á ymsum, forskotnum hæddum (terrassum), er ein salur við sløttum gólvi og einum palli, ið kann faldast og flytast, eins og í Norðurlandahúsinum. Stólarøðini verða goymd í eini goymslu nær við, og reingerðarrúm er við síðuna av.

3.4. Lestrarumhvørvi

Bólkarúm

Ein partur av læruumhvørvinum er settur saman av serligum rúmum og hentleikum, sum styðja upp undir formligu undirvísingarhølini. Í nýggja felagsbygninginum skulu fleiri bólkarúm í ymiskum støddum byggjast, t.d. til 4, 6 og 10 fólk.

Bólkarúm eru vanliga lítil, afturlatin rúm í trimum ymiskum støddum, har bólkar í ymiskum støddum kunnu arbeiða í friði og náðum.

Góður akustikkur, góð útlufting, gott ljós og góð KT gera allan munin fyri úrslitagott virkisføri í bólkaarbeiðinum.

Bólkarúmið skal vera innrættað við møblum, ið kunnu flytast, so at bólkurin fær arbeitt inni í rúminum í fleiri tímar. Møblar skulu vera ergonomiskir, so til ber at brúka teir í eitt longri tíðarskeið.

AV-skíggjar, tussjtalvur, tøkni til fjarlestur/fjarbólkaarbeiði og onnur tíðarhóskandi tøkni í hóskandi tali til hvørt bólkarúm skal kunna heingjast upp.

Av tí at arbeiðsøkini í einum bólkarúmi ikki verða mett at vera fastir arbeiðsstaðir, kunnu hølini vera staðsett í kjarnaøkjunum/myrku økjunum í einum stórum bygningi fyri at fáa sum mest burtur úr teimum myrku m2 og flow-økjunum.

Umstøður til bólkaarbeiði kunnu eisini hugsast uttandura í krókum við lívd, tá tað viðrar.

Lestrarumhvørvi

Tað er týdningarmikið fyri atdráttarmegina og samlaða virðið hjá Setrinum at kunna bjóða studentum á øllum stigum, uttan mun til fysiskan ella sálarligan førleika, eitt kveikjandi lestrarumhvørvi.

Lestrarumhvørvið eigur at hava nógv pláss í og kring stóra rúmið í miðjuni, t.e. samkomustaðin, so sum nissjur í gongini og krókar til uppihald tætt við undirvísingarhølini, sum hava:

- Sersniðgivnar, akustiskt regulerandi møblar við góðari KT og nóg mikið av stikkkontaktum, ið kunnu vera eitt virðismikið og nýtiligt amboð til bólkaarbeiði
- Føst borð/fastar borðplátur framvið í tí stóra rúminum. Um tey eru stillað t.d. við endan á einum atriumi, er hetta ein góður máti at skapa lív í stóra rúminum og gagnnýta øki, sum vanliga ikki verða nýtt so nógv

- Lítlar samansetingar av borðum og stólum í kafe-stíli, helst sum partur av kafeini
- Borð og stólar til bólkar við 4-6 fólkum
- Smá, hálvafturlatin rúm, sum eru sniðgivin til at rúma smærri bólkum ella lesandi, sum gjarna vilja arbeiða einsamøll. Hesi rúm kunnu vera væl umtókt sum lítil, friðarlig støð, har tað er pláss fyri tøgn og hugdýping í tí stóra rúminum
- Gongir, sum kunnu gerast lívligari við at hava sitipláss í nissjum ella á balkongum
- Tekøkar, sum eiga at vera staðsettir í ella í nánd av lestrarumhvørvi og bólkarúmum, tó uttan at órógva tey, sum arbeiða tætt við
- Ymiska blandaða list

3.5. Skrivstovur

Skrivstovuarbeiðspláss og felagsfunktiónir

Í nýggja felagsbygninginum skulu skrivstovupláss gerast. Tey eru:

- Høli til setursleiðsluna, fyrisitingina og lestrarskrivstovuna
- Liðilig skrivstovupláss til deildirnar og ph.d. lesandi

Arbeiðsplássið

Arbeiðsplássið skal fremja nýmenning, tryggja íblástur og vera karmur um samstarv millum starvsfólk á Setrinum.

Arbeiðsumhvørvið er - eins og lestrar- og læruumhvørvini - sera umráðandi fyri góða úrslitið hjá Setrinum. Øll starvsfólk, uttan mun til um tey arbeiða á einari deild, í fyrisitingini ella við rakstrinum, skulu virðismeta sítt arbeiðspláss og kunna gleða seg til at fara til arbeiðis allar dagar í árinum. Setrið hevur stóra virðing fyri starvsfólkunum, tí uttan dugnalig og nærløgd starvsfólk hevði Setrið neyvan havt nakrar studentar. Tí er tað altavgerandi at tryggja starvsfólkunum tað besta arbeiðsumhvørvið, ið hugsast kann.

Í nýggja felagsbygninginum er eitt úrval av ymiskum skrivstovum, sum fevna um afturlatnar skrivstovur til 1, 2 ella 4 fólk. Skrivstovuplássini hjá fyrisitingini og deildunum skulu vera sett saman av nógvum skrivstovum til eitt fólk og nøkrum fáum felagsskrivstovum til 2, 3 ella 4 fólk. Tað er umráðandi, at skrivstovan kann tillagast til tann tørvin, tann einstaki hevur til bæði samstarv og arbeiðsfrið.

Skrivstovurnar hjá lestrarfyrisitingini skulu vera tætt við, har tey lesandi halda til, og møguleiki skal vera at hava rúm til samrøður í trúnaði. Fyri setursleiðsluna, fyrisitingina og skrivstovuplássini á deildunum er ynskiligt, at hesi vera staðsett saman á einum stað, har tey lesandi og almenningurin ikki koma framvið í gerandisdegnum.

Tað er umráðandi fyri virkisførið á skrivstovunum í nýggja felagsbygninginum, at tað er møguligt at arbeiða í friði og náðum. Samstundis eru samstarv og samskifti sínámillum líka umráðandi, og dentur skal leggjast á hetta í ráðleggingini, byggingini og innrættingini av skrivstovuhølunum. Skrivstovuarbeiðsplássini skulu tí skipast soleiðis, at tey styðja upp undir bæði einstaklingsarbeiði og samstarv.

Fyri at økja um samstarvið og vitanarbýtið á einstøku skrivstovunum, skulu plássini hava nógvar stuðulsfunktiónir og sosialar sonur, og tað skal vera lætt at fáa atgongd til náttúruna.

3.6. Stuðulsfunktiónir

Stuðulsfunktiónir

Stuðulsfunktiónir verða skipaðar sum funktiónir og øki í og í sambandi við skrivstovuhølini sum afturlatin rúm, klivar og innbúgv, sum styðja upp undir ávísu skrivstovuøkini. Stuðulsfunktiónirnar eru týdningarmiklar fyri virkisførið á einari nútímans skrivstovu, tí tær skapa karmar um formligt og óformligt samskifti millum starvsfólk við liðiligum arbeiðsplássum, ad hoc-rúmum, sonevndum breakout-rúmum og kyrrrúmum (kvirrurúmum) í skrivstovuøkinum. Harumframt eru tekøkar og kaffistøðir, har tað ber til at taka ein væl uppibornan steðg saman ella hvør sær.

Stuðulsfunktiónirnar eru m.a.:

- Sosialar sonur; óformlig og formlig sitiplass
- Tekøkar og kaffistøðir
- Ad hoc-rúm
- Liðilig arbeiðsplass
- Kyrrrúm/kvirrurúm
- Ljóstøka
- Goymsla

Sosialar sonur - óformlig og formlig uppihaldsstøð

Í sambandi við skrivstovuplássini skulu óformligir samkomustaðir gerast, t.d. sum nissjur ella horn í felagsøkjunum. Tekøkar, uppihaldsstøð og lítil ad hoc-rúm, ljóstøka, goymsla, afturlatin rúm til samrøður í trúnað o.a.m. skulu staðsetast við denti á at tryggja eina javna frástøðu frá øllum skrivstovuplássunum til stuðulsfunktiónirnar. Øll skrivstovuplássini býta hentleikarnar, so at mest fæst burturúr fleirvirkisførinum. Men ferðslan á gongini skal ikki órógva arbeiðið á skrivstovunum.

Í nýggja felagsbygninginum skulu óformligu sosialu sonurnar, m.a. tekøkarnir, innrættast við bæði bleytum møblum og borðstovukendum møblum, har starvsfólkini kunnu hittast, hava hátíðarhald ella hava ein minni, óformligan fund.

Tær meira formligu sosialu sonurnar eiga at vera væl útgjørdar við føstum og leysum innbúgvi, sum styðjar upp undir samstarv. Møblar í hesum øki skulu stuðla ymiskum støðum í arbeiðinum: høg borð, høgir stólar, lág borð, lágir stólar, bleytir stólar ella sofur við høgum baki. Allir hesir møblarnir eru við til at skapa eitt optimalt akustiskt og ergonomiskt arbeiðsumhvørvi.

Tekøkar

Tekøkurin er eitt deiligt og friðarligt stað at halda ein steðg. Hann er eisini karmur um óformligar fundir millum starvsfólk (morgunfundir, fyrikunningar og sosialar samkomur), og hann er til samskifti millum dagligu brúkararnar, uttanhýsis brúkarar og gestir.

3.7. Burðardygd

Visjón fyri burðardygd í felagsbygninginum

Aðalmálið hjá Fróðskaparsetri Føroya er burðardygg menning av føroyska samfelagnum. Felagsbygningurin skal vera partur av tí burðardyggu samfelagsmenningini og tískil skapast við atliti at heildini og við hóskandi javnvág millum sosial-, umhvørvislig- og fíggjarlig viðurskifti.

Visjónin fyri burðardygd tekur støði í Strategiætlanini "Mál og Mið 2020-2024" hjá Fróðskaparsetrinum og Arkitekturpolitikkinum "Karmar um lív" (*Sí fylgiskjal 06*). Visjónin hevur tað mál, at byggiverkætlanin raðfestir skynsama og haldgóða nýtslu av tilfeingi, og tað er galdandi fyri bæði sjálva byggingina og fyri raksturin og viðlíkahaldið. Loysnir skulu vera úrslit av einum tilvitaðum avgerðargrundarlagi, ið nýtir lívsringrásgreining (LCA) og heildarkostnaðarmeting (LCC) til javnan at meta umhvørvisávirkan og fíggjarligt virkisføri undir prosjektering. Dentur skal vera á lívsringrásina hjá felagsbygninginum við endamálinum at tryggja størst møguliga burðardygd.

Samstundis er visjónin fyri burðardygd treytað av funktiónтørvinum hjá felagsbygninginum, ið snýr seg um at skapa eitt umhvørvi, ið stuðlar undir trivna og menning hjá bæði lesandi og starvsfólkum. Funktiónтørvurin er orsøkin til byggiverkætlanina og setur karmarnar fyri sosiala burðardygd. Hetta merkir, at burðardygg átøk skulu hava fyrilit fyri, at tey ikki neiliga ávirka funktiónina hjá bygninginum og soleiðis ta sosialu burðardygdina.

Við høvuðsdenti á funktiónтørvin skal felagsbygningurin bæði sniðgevast og byggjast á ein hátt, sum avmarkar umhvørvisárin, og tilfarsval skal vera úr einum sjónarhorni um lívsringrás og miða eftir at økja livitíðina hjá bygninginum. Samstundis skal fyrilit vera fyri, at felagsbygningurin er ætlaður fleiri ættarliðum, og tessvegna er livitíðin hjá bygninginum sera viðkomandi í metingini av fíggjarligum viðurskiftum. Felagsbygningurin skal tískil skoðast sum ein langskygd íløga, har loysnir skulu metast eftir heildarkostnaði og miða eftir at avmarka ognarkostnað, t.v.s. útreiðslur av rakstri og viðlíkahaldi.

Burðardygd verður í hesum føri ikki tilskilað av sermerktum krøvum ella markvirðum. Heldur skal møguleiki vera fyri nýhugsandi loysnum, har burðardygg átøk eru partar av arkitekturinum og verkætlanarleistinum. Vónin hjá Fróðskaparsetri Føroya er, at byggiverkætlanin Felagsbygningurin verður eitt tekin um aðalmál stovnsins og er við til at seta dyk á menningina av burðardyggari bygging í Føroyum.



3.8. Av- og áskipan og atkoma

Parkering til bilar er avgerandi, og hugsast skal, at tey flestu parkera á Frælsinum. Atkoma skal eisini vera upp at felagsbygninginum við avmarkaðari parkering og er mest hugsað sum stuttíðarparkering til gestir, av- og á skipan av vørum og tilfari umframt p-plass til rørslutarnað.

Súkklur og líknandi akfør skulu hava parkering tætt at felagsbygninginum við møguleika fyri at vera undir taki og í lívd fyri veðri.

3.9. Útiøkið

Rundan um bygningin skal vera hugaligt at vera, og tað skal vera dragandi at fara útum. Nakrar deildir kunnu hugsast at hava undirvísing uttanfyri, og bólkaarbeiði og uppihald uttanfyri skulu eisini kunna vera í krókum við lívd. Tað ið enn er eftir, av viðbreknu náttúruni í økinum, eigur at verða handfarið við umhugsni. Ynskiligt er, at landslagið og tær natúrligu formatiónirnar av steinum og øðrum verða varðveittar í størstan mun og verða hugsaðar inn í bygningin og landslagið. (*Sí fylgiskjal 02*)

3.10. List

Ein týðandi partur av einum nýhugsandi og kveikjandi bygningi er list. Bygningurin skal hava pláss fyri bæði størri og smærri listarverkum, umframt at listin kann hugsast at vera ein fastur partur av bygninginum.

3.11. Rakstur og viðlíkahald

Ein týðandi liður í atdráttarmegini hjá einum bygningi er reinføri og viðlíkahald, so bygningurin ikki fellur í órøkt. Umstøðurnar til rakstur og viðlíkahald mugu vera góðar. Tað skal vera lætt at koma til goymslur til útgerð (t.d. reingerð, depot til papír o.t.) á øllum hæddum, og í einum virknum bygningi, sum verður opin tað mesta av samdøgrinum, er tað týðandi, at hesar funktiónir ikki órógva virksemi hjá Setrinum í felagsbygninginum. T.d. kann ein flutningslyfta staðsetast, har tað almenna og tey lesandi vanliga ikki ferðast, men har hon er lætt atkomulig til vøruinnlating uttanífrá. Ruskskiljing og løtt atgongd til burturbeining av ruski skal eisini vera.

3.12. Hitaverk

Bygningurin skal hitast av varandi orkukeldum, og besta loysnin til hetta skal veljast.

4.0. Teknisk krøv

4.1. Studio

Eitt rúm skal skipast sum studio til tónleik og hava møguleikar fyri fjarundirvísing, upptøku av podcast, webinar og tílíkum. Hetta rúmið setur eyka krøv til ljóðgóðsku og akustikk.

4.2. Høli til konsertir

Eitt høli skal vera serliga tillagað at halda konsertir í, har krøvini til ljóð, ljós og akustikk eru størri enn til vanliga undirvísing.

4.3. Samskiftistøkni

Bygningurin skal útgerast við vælútbygdari samskiftistøkni (fipur og koparnet sameint) bæði inni í húsinum og út úr húsinum.

4.4. Luftskifti

Luftskiftisskipanir skulu projekterast við støði í viðkomandi normum og standardum. Víst verður annars til BK 17.

4.5. Innleggingar

Í sambandi við innleggingar sum heild verður víst til BK 17. Umframt at fáa við neyðugar installatiónir til ætlaða virksemið í bygninginum er umráðandi at tryggja, at viðlíkahaldið av hesum verður so lætt sum gjørligt. Eisini er umráðandi at hugsa um leiðarvegir og atkomuligheit, sum taka fyrilit fyri, at tað verður so smidligt sum gjørligt at laga seg til broytingar, sum møguligt framtíðarvirksemi kann hava við sær.

4.6. Bruni

Bygningurin skal lúka galdandi myndugleikakrøv viðv. bruna.

5.0. Fígging og tíðarætlan

5.1. Fíggjarlig viðurskifti

Prosjekteringin skal lýsa, hvat væntaði heildarkostnaðurin verður. Nærri lýsing av hesum í fylgiskjali 05, "Burðardygdarætlan felagsbygningurin".

5.2. Tíðarætlan

Tíðarætlan verður gjørd, tá ráðgevi er settur.

5.3. Fylgiskjøl

Fylgiskjal 01 Økið
Matrikulkort, har byggiøkið úr Heildarætlanini er markerað

Fylgiskjal 02 Færøernes Universitet Strategisk Campusplan
Fróðskaparsetur Føroya/Henning Larsen Desember 2018

Fylgiskjal 03 Skúlin á Frælsinum
Broytt flatmynd úr Heildarætlanini, har skúlin á Frælsinum er settur inn

Fylgiskjal 04 Rúmskrá
Rúm og fermetrar

Fylgiskjal 05 Burðardygdarætlan Felagsbygningurin

Fylgiskjal 06 Arkitekturpolitikkur í Føroyum
Karmar um Lív

Fylgiskjal 07 DWG og RPJ fílar av økið

Fylgiskjal 08 Tekningar av Havstovuni

Fylgiskjal 09 Tekningar av Vinnuháskúlan

Fylgiskjal 10 3D tekningar frá Heildarætlan 2018

Yviri við Strond 17 // Postsmoga 78 // FO-110 Tórshavn // Tel. +298 340 800 // lv@lv.fo // www.landsverk.fo